


# Lyktapeli við nummarplátu

Eitt av okkara blaðfólkum kom fram á hendan lyktapelan í Eysturoynni herfyri. Eitt er, at akfør, sum koyra á vegnum skulu hava nummarplátu, men vit hava ikki ofta upplivað lyktapelar við nummarplátu. Spurningurin er so, um hesin lyktaplein skuldi fingið parkeringsbót fyri at standa á gonguteignum.

# Tunguna mitt í munninum









Djór kunnu loyva sær so nógv meira, enn vit menniskju kunnu. Tað verður ikki hildið verða hóskandi, at fólk hava tunguna hangandi úr munninum – skuldi líka verið onkur ovbyrjað løta – men tað kunnu djórini saktanst – og tað sæst eisini á hesum myndunum, sum eru av heimasíðni place-for-laugh.com



# Hvar eri eg?

Barrack Obama, sum ætlar sær at gerast næsti forsetin í USA, ferðast nógv í hesum søgum. Her er hann á veg úr flogfari, men tykist ikki rættiliga vita, hvar hann er staddur. Kundi verið í Vágum? Ja, tað er ivaleyst einasti møguleiki at fáa hann til Føroya – at hann flýgur skeivt

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Løgmaður kirurgur?**
Løgmaður má skera ígjøgnum á sjúkrahúsøkinum
ÚF

**Nógvir bátar ella ferðafólk?**
Størri áhugi at sigla til Skotlands
Vikublaðið

**Og vit sum hildu, at hon var grundarlagið**
Oljan er ein hóttan móti vælferðini
Olivant

**Neyðsemjan er ikki ein semja**
Samgongan: Ongar semjur - bert neyðsemjur
Olivant

**Rógvi mannar eitt heilt lið**
Rógvi og Hødd spældu javnt
Dimma

**Bara teir ikki fáa ilt í nakkan**
OM-vinir líta aftureftir og frameftir
Sosialurin

**So hart spæla teir heldur ikki**
»Víkingar fríkendir fyri morð«
Dimma.fo

# Spentur dómari



Eiler Rasmussen er millum dómararnar, sum leiða dystir í bestu mans-deildini í fótbólti. Á hesari myndini, sum liggur á heimasíðuni hjá NSÍ, stríðast spælari hjá Víkingi og NSÍ um bóltin. Og onkur, sum hevur lagt myndina á heimasíðuna nym.fo, heldur, at dómarin sær rættiliga spentur út. Tað kunnu vit bara taka undir við – hann hevur næsta hug at skalla bóltin sjálvur